# Oljuvinnufelagið

# Ársfrágreiðing fyri 2016

# Um felagið

Oljuvinnufelagið er eitt áhugafelag fyri fyritøkur, sum longu eru virknar í oljuvinnuni ella ætla sær virknan lut í hesi vinnu.

Uppgávan hjá felagnum er at útinna felags áhugamál og at verja áhugamálini hjá limunum. Umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Tá stovnandi fundurin varð 2. apríl í 2001 vóru tað 27 feløg, sum teknaðu seg sum lim. Í dag er limatalið 32. Í nevndini í Oljuvinnufelagnum sita:

Magni Arge, formaður
Gunnbjørn Joensen, næstformaður
Anja Jacobsen
Jostein Petersen
Eli Lassen

Tiltakslimur er Christian Danielsen.

# Yvirlit yvir limirnar

| | |
|---|---|
| Akraberg | PAM Offshore service |
| Articon P/f | Poul Hansen P/f |
| Atlantic Airways | Poul Michelsen P/f |
| Atlantic Supply Base | Radioservice P/F |
| Damfar P/F | Reyni-Service P/F |
| Demich P/F | Runavíkar Havn |
| Faroe Offshore Service P/f | Samskip P/f |
| Faroe Ship P/f | Skansi Offshore P/f |
| Ingeniørvirkið Jostein Petersen | Solar P/F |
| Kemilux | Thor P/F |
| KJ-Hydraulik | Tórshavnar Havn |
| Klaksvíkar Sleipistøð P/f | Vest Pack P/F |
| LM Electric P/f | Vágs Havn |
| Lundin (Lundin software), Sp/F | Vónin P/F |
| Magn | Virkisráðgeving Sp/f |
| Meginfelag Búnaðarmanna L/F | Vinnuháskúlin |

# Virksemi á føroyskum øki og innan føroyska oljuvinnu

## Nýtt útbjóðingarumfar til oljuleiting í 2017

17. mai 2017 lat fjórða útbjóðingarumfar upp. Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Jarðfeingi skipaðu fyri almennum tiltakið, har Poul Michelsen, landsstýrismaður, lat útbjóðingarumfarið upp. Kunngjørt varð eisini, at útbjóðginarumfarið verður opið í 9 mánaðir, og letur sostatt aftur 17. februar 2018.

Jarðfeingi er í løtuni við at kanna og tulka allar dátur av nýggjum, fyri betur at skilja ta jarðfrøðiligu menningina av føroyska økinum. Um miðjan juni 2017 fara umboð fyri Jarðfeingi saman við umboðum frá samstarvsfeløgunum til London, har arbeiðið, sum er gjørt seinastu árini, verður lagt fram fyri innbodnum oljufeløgum.

Rættuliga stórur áhugi hevur verið fyri leitiloyvunum á Írska landgrunninum herfyri, og eisini hava leitifeløg funnið olju fyri kortum vestanfyri føroyska markið. Tiskil verður mett, at útlitini tala fyri, at áhugi verður fyri føroyska landgrunninum.

## Marknaðarføra føroyskar veitarar

Seinastu tvey árini hevur Oljuvinnufelagið arbeitt miðvíst við tiltøkum, sum staðseta Føroyar sum ein tænastudepil fyri frálandavinnuna og skipaferðslu, sum siglir framvið á okkara leiðum.

Føroyskar tænastuveitingar til sjóvinnu eru á høgum støði og stendur mát við somu tænastur í okkara grannalongum. Vit hava, umvegis boringarnar í Føroyum og vitjanini hjá West Hercules, prógvað, at føroyskar sjóvinnuveitingar eru væl og virðiliga kappingarførar á altjóða stigi.

Í 2015 var heimasíðan www.maritime-services.com sjósett, samstundis sum ein grafiskur samleiki og ymiskt tilfar varð gjørt. Í 2016 hevur felagið arbeitt víðari við átøkum, sum marknaðarføra føroyskar veitarar og sum styrkja um kappingarføri okkara.
Í 2016 hava hesi tiltøk m.a. verið:

**Samleika til landabás:**
Grafiski samleikin til føroyska landabásin á ONS 2016 var gjørdur av nýggjum í 2016. Nýggi básurin hevði flottar myndir og tekstir, sum stuðlaðu undir boðskapin um Føroyar sum ein tænastudepil.

**Frágreiðing um sjóvinnuveitingar:**
Á vári 2017 varð frágreiðing um sjóvinnuveitingar løgd fram. Úrslitið vísti greitt, at vakstrarmøguleikar eru innan føroyskar sjóvinnuveitingar, og at hetta hevur týðandi búskaparliga ávirkan á føroyska samfelagið.

Mett var, at í 2015 var samfelagsbúskaparliga inntøkan frá maritimum tænastum millum 330 og 430 milliónir kr. um árið. Av hesum var mett, at umleið 170 milliónir kr. um árið vóru beinleiðis inntøkur frá sjóvinnuveitingum til útlendsk skip.

Í frágreiðingini var dentur serliga lagdur á at lýsa marknaðarmøguleikar millum fiskivskip, frálandaskip og –pallar, cruise skip og farmaskip. Í fjør sigldu 600 skip fleiri enn 2.000 túrar í føroyskum sjóøki. Nógv av hesum skipum leggja ikki at í Føroyum. Hugsast kann at fleiri av teimum hava tørv á sjóvinnuveitingum, sum føroyskar fyritøkur og havnir kunnu veita.

Frágreiðingin staðfesti eisini, at neyðugt er at betra um føroyska hagtalsgrundarlagið, og at tað er týdningarmikið at samskipa og staðseta marknaðarføring av Føroyum og føroyskum tænastum, og byggja víðari á tað arbeiði, sum verandi fyritøkur og myndugleikar hava arbeitt við seinastu árini.
Frágreiðingin er at finna á: http://industry.fo/kunning/boklingar-og-fragreiðingar/fragreiðingar.

**Limakanning:**
Í 2016 varð ein kanning gjørd millum limir felagsins. Kanningin staðfesti, at limir halda tað verða týdningarmikið at samskipa eina felags marknaðarføring av føroyskum fyritøkum, sum veita sjóvinnuveitingar. Hinvegin vóru fleiri limir ivasamir um úrslitini sum spurdust burturúr luttøkuni á landabási á Offshore Europe stevnuni í Aberdeen.

Tíverri var áhugin so lítil millum fyritøkurnar, at Føroyar, fyri fyrsu ferð í hesi øldini, ikki taka lut við egnum bási. Fyrr stuðlaði landið slíkum átøkum, men slíkur stuðul fæst ikki longur. Jarðfeingið og oljufeløgini hava heldur ikki játtað umsøknum til landabás burturav førleikamenningar pengunum, sum eru settir av til føroyska oljuvinnu.

**Lýsingafilmur "Children of the Sea":**
Á vári 2017 gjørdi Cowboyfilm ein lýsingarfilm, sum Oljuvinnufelagið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið samstarvaðu um. Endamálið við filminum var at lýsa Føroyar sum eitt framkomið oyggjasamfelag og varpa ljós á tær sjóvinnutænastur, sum føroyskar fyritøkur, havnir og myndugleikar kunnu veita. Stutt sagt: at marknaðarføra Føroyar sum sjóvinnutjóð og ein kappingarføran tænastudepil.

Filmurin varð væl móttikin. Limir felagsins kunnu brúka filmin í teirra marknaðarføring, og Jarðfeingi, Sjóvinnustýrirð og FOIB hava eisini víst filmin, tá tey hava verið á messum.

Hagtøl:

| | |
|---|---|
| Vimeo: | 7.090 fólk hava klikt á filmin. Harav hava 3.370 hugt eftir øllum filminum. |
| Facebook: | 29.000 vísingar og filmurin er deildur 193 ferðir. 450 fólk dáma síðuna "Faroe Islands Maritime Services". |

Filmurin er at síggja á: www.maritime-services.com.

**Kanning millum limir í Antares:**
Oljuvinnufelagið ger í løtuni eina spurnarkanning millum limir hjá Antares. Føroysk sjófólk eru mong í tali, og tey sigla við skipum og reiðaríum um allan heimin. Tí er áhugavert at frætta, hvørjar møguleikar, men eisini forðingar, føroysk sjófólk halda verða í samband við at fáa skip til Føroyar at keypa tænastur. Endamálið er eisini at arbeiða saman við Antares við at fáa føroysk sjófólk at verða ambassadørar fyri Føroyar og føroyskar veitarar.

# Virksemi annars

## Luttøka á oljumessum

Oljuvinnufelagið hevur ábyrgdina av at samskipa føroyska landabásin á Offshore Northern Seas í Stavanger og Offshore Europe í Aberdeen.

## Offshore Northern Seas 2016

Offshore Northern Seas 2016 var í døgunum 29. august - 1. september í Stavanger.

Hesar fyritøkur luttóku á landabásinum: Atlantic Supply Base, Pam Offshore, Faroe Ship, Atlantic Airways, Klaksvíkar havn, Runavíkar havn, Tórshavnar havn, Jarðfeingi og FOIB.

Tórshavnar kommuna saman við Runavíkar kommunu luttóku aftur í ár á festival-økinum niðri við havnina í Stavanger. Skipað var fyri móttøku umborð á Westward Ho, sum seinastu nógvu árini hevur ligið við bryggju í Vågen. Føroyska tjaldið og móttøkan umborð á Westward Ho eru vorðin ein afturvendandi og týdningarmikil partur av messuni í Stavanger, sum nógvir av okkara samstarvsfeløgum fegnast um.

Nógv vitjandi vóru á føroyska landabásinum, har føroysku fyritøkurnar hittu kundar og samstarvsfelagar. Útlendsk tíðindafólk vóru eisini áhugað í Føroyum, og tey vildu frætta um oljuboringar, komandi útbjóðingarumfarið og veitaravinnuna í Føroyum. Nógv varð somuleiðis gjørt burturúr at marknaðarføra Føroyar sum ein tænastudepil í Atlantshavinum.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, vitjaði eisini á messuni og mánadagin 29. august varð skipað fyri móttøku á landabásinum. Landsstýrismaðurin greiddi frá um loyvisumfarið í 2017 og um veitaravinnuna í Føroyum. Góð undirtøka var fyri móttøkuni, og fleiri útlendskir gestir vitjaðu landabásin og sýndu áhugað fyri føroyskum viðurskiftum.

Messufyriskipararnir boða frá, at íalt vóru 65.718 vitjandi á ONS 2016, og 1.241 framsýnarar frá 40 londum luttóku á messuni. Góða undirtøkan vísir eitt ávíst bjartskygni í vinnuni og staðfestur, at ONS er ein týðandi messa fyri fyritøkur í starvast innan olju- og veitaravinnuna.

## Vaktarskiftið í Oljuvinnufelagnum

Gunnbjørn Joensen, ið hevur tænt felagnum sum nevndarlimur í 16 ár, stillar ikki upp aftur til nevndina. Felagið takkar honum fyri stak gott samstarv.

Magni Arge hevur boðað frá, at hann fer at leggja frá sær sum formaður. Hann hevur verið formaður øll árini, síðani felagið var stovnað, og hann var eisini formaður í undangongufelagnum Føroya Oljuídnaður, sum var sett á stovn í 1993.